# Kjak



William Smith

## Harðræði í fólkaræðnum

Vit hoyra javnan um grummar yvirgangsatgerðir, sum fáfongdir, eirindarleysir margbøðlar fremja móti tjóðum, teir hava tikið valdi á. Vit øtast um tað, vit hoyra, og vit hugsa, at tað er gott, at slíkt ikki hendir í okkara demokratiska og menniskjaliga fosturlandi. Tað er, Gud havi lov, bara í fjarskotnum, talibaniseraðum londum, at mannarættindi verða kúgað. Ikki í okkara dýrabara vælferðarsamfelag. Okkara samfelag er grundað á tey kristnu virðini, á humanar grundreglur og andaligt margfeldi. Vit eru í heila tikið so tilvitað um tað rættvísa, at vit skilja ikki, at talibanskar samfelagskipanir eru til, og vit skultra okkum í frelstum hugmóði.

Men so kortini.

Skuldi onkur hildið, at her hjá okkum valda bara rættvísi, vísdómur og menniskjaleiki, so vildi eg meint, at viðkomandi er farin eitt sindur skeivur. Í hvussu so er vórðu vit herfyri dyggiliga mint á, at okkara fólkaræðiliga samfelag rúmar máttmiklum myndugleikum, ið útinna sítt lógarfesta yvirvald við slíkum ídni, at kristnu virðini og humanu grundreglurnar tykjast at vera býir í Afghanistan.

Hesir somu myndugleikar, ið høvdu játtað, at parið skuldi sleppa at verða foreldur, tók eitt smábarn, sum tey høvdu ættleitt fyri kortum, frá teimum aftur.

Tú hoyrdi um sorgarleikin í útvarpinum, og tú las um hann í bløðunum. Við tínum besta vilja skilti tú ikki, at hetta hendi, men tú skilti, at hetta snúði seg um, at myndugleikarnir vóru vorðnir varugir við, at onkur leiðregla ikki var fylgd í ættleiðingarmannagongdini. Tí gjørdi teir av at ógilda ættleiðingina.

Nú var ikki talan um vanlig, biologisk foreldur, ið kunna gera og vera ímóti sínum Gudgivnu børnum, sum teimum lystir. Men høvdu ættleiðingarforeldrini verið órein ímóti barninum? Hevði barnið verið fyri harðskapi av onkrum slag? Ikki eftir tí, vit fingu at vita. Tað varð sagt, at barnið treivst væl. Her er vert at minna á, at tað er ikki vanligt at taka børn frá biologiskum foreldrum, uttan so, at talan er um grova misrøkt. Og tað kemur fyri, at biologiskt gitin børn verða bæði vanrøkt og skemmað av sínum biologisku foreldrum, uttan at mynduleikarnir tá gera sína skyldu.

»Bíða nú!«, mótmælir tann skilbundni. »Tú vevur manngjørdar lógargreinir og tað Gudgivna saman í ein vavgreyt. Tú mást skilja, at menniskjaleiki og miskunn eru ikki annað enn forðandi, sentimentalir kleppar fyri lógbundna skynseminum, og tað ber ikki til í einum rættarsamfelag!«

Satt er sum sagt varð. Og við tað at onkur prosedura í ættleiðingarmannagongdini varð lopin um, høvdu somu myndugleikar skyldu til at benda mannagongdina á røttu kós. Lógargreinir eiga at verða hildnar, og leiðreglur skulu verða fylgdar. Tað gerst ikki við, at ein familja av tí sama fer í skeljasor. Ættleiðingarnevndin hevur bara gjørt sína skyldu, og vit kunna ikki pilka við hennara vísa, salomonska atburð. Tað er ikki skyldan hjá ættleiðingarnevndini at vera menniskjalig. Tað avgerandi er, at tað kaldgløgga rættvísi er fullgjørt.



Kirstin Strøm Bech
*Borgmeistari*
*Vágur*

## Suðuroyggin skal bera 43 % av sparingini

Fyri lítlum ári síðani byrjaði byggingin av ellis- og røktarheiminum í Vági av álvara, og í dag er húsið reist og verður væntandi liðugt í mars 2011.

Nú verkætlanin er veruleiki og er komin væl áleiðis, eru fólk byrjað at leggja inn umsóknir til búpláss, hóast viðtøkur og umsóknarbløð ikki eru gjørd ella lýst.

Tað er ikki neyðugt hjá mær at greiða frá truplu og møtimiklu gongdini í hesum máli. Hana kenna flest øll, men tað stutta av tí langa er, at fýra kommunur - Vágur, Sumba, Porkeri og Hov átóku sær eina lániskuld á góðar 35 mió kr afturfyri at fáa:

- 24 eldrabúpláss afturat í Suðuroynni
- Umleið 40 ársverk

Sjálvandi eru búplássini til eldri tað grundleggjandi og týdningarmesta í hesum máli, men 40 ársverk í einum øki, har kreppan rakti meint, og fólkaflytingin hevur verið stór, hevði havt alstóran týdning. Júst hetta tóktist eisini tá at liggja í kortunum hjá landsstýrinum.

Nú um dagarnar bórust tíðindi um ætlaðar sparingar á eldraøkinum. Útbyggingin á økinum verður ikki eins stór og ætlað, og 30 búpláss skulu niðurleggjast.

Av hesum 30 plássum eru tey 13 í Suðuroynni – einum øki har fólkasamansetingin er soleiðis háttað, at lutfalsliga eru fleiri eldri fólk enn í øðrum økjum.

Í Suðuroynni búgva umleið 10% av Føroya fólki. Sparingin hjá Rósu Samuelsen leggur upp til, at eldraøkið í Suðuroynni skal bera góð 43% av ætlaðu sparingini.

At grunda hesar ætlaðu broytingar á sømiligar og virðiligar umstøður á Suðuroyar ellis-og røktarheimi fellur einum fyri bróstið. Sjálvandi skulu okkara gomlu og røktarkrevjandi hava sámuligan bústað, men hetta er ikki orsøkin til ætlaðu broytingar á hesum heimi.

Rósa Samuelsen – kalla ein spaka fyri ein spaka. Broytingin er ein kærkomin undanførsla fyri sparingum á økinum.

Heldur enn at niðurpína eldraøkið og ikki minst tær kommunur, sum hava átikið sær at byggja nýggja ellis-og røktarheimið, átti tillagingin á Suðuroyar ellis- og røktarheimi at verði gjørd so við og við, soleiðis at talið á búplássum verður tað sum upprunaliga ætlað – og sum lovað varð kommununum, sum átóku sær stóru lániskuldina fyri eitt øki, sum landið eigur – men hevur »forsømt« í mong mong ár.

Vit í Suðuroynni kunnu ikki góðtaka hesa viðferð. Vit kunnu ikki góðtaka, at samgonguflokkarnir, sum upprunaliga komu við uppskotinum um bygging av nýggjum ellis- og røktarheimi í Vági nú renna undan givnum lyftum.

Viðgerðin av hesum máli fer nú at vísa okkum, hvørt givin lyftir verða hildin. Hvørt vit í Suðuroynni eiga nakran góðan í landsins leiðslu.

Livst so spyrst.



Oddmar á Steig

## Opið bræv til løgmann um rúsdrekka

**Viðvíkjandi rúsdrekkapolitikki landsins!**

Heldur tú, at tað er rætt, at rúsdrekka landsins liggur undir landsstýrismanninum í vinnumálum? Lógin um rúsdrekka landsins tosar um at tálma brúkið av rúsdrekka. Kann tað vera rætt, at vinnumálastýrið, ið skal fremja vinnumál, er rætta stýrið í rúsdrekkamálinum? Eg – og mong onnur við mær undrast á »logikkin« hjá landsstýrinum í hesum máli.

Er tað ferðavinnan, E.S. o.s.fr. ið skal stýra rúsdrekkamynstrinum í Føroyum? Hvussu við teim vaksandi rúsdrekkaloyvunum – serliga her í Tórshavn – og náttarlívinum? Mær er sagt, at tað eru uml. 40 skeinkiloyvi í Tórshavn? Hvussu við heiligdagslógini? Fyribils hevur mentamálakvinnan »súltað« hana í minst eitt ár – góðtekur tú tað?

Vit eru mong, hava ljósari dreymar um, at Føroyar skuldu verið ein fyrimynd á nógvum økjum – og at politiið skuldi havt minni at gera í komandi tíðum. Men tá landsmyndugleikarnir ganga á odda í lógloysi, hvat kunnu vit so vænta!

Vónandi gert tú títt íkast til at fremja landsins lógir á ein rættan hátt. Albert Schweizer segði: Lívið hevur lært meg tað, at fyrimyndin er altíð tann besti lærimeistarin.

Góði Kai Leo, royn títt ítarsta, so vit kunnu síggja fram móti ljósari tíðum í Føroyum!

E.S. Rúsdrekka ella rúsevni – byggja ikki land.
Sunn sál í sunnum likami.